## Størsta legatið verður latið

**Landsins størsta legat, Gávugóðs úr Grunni Thorvalds Poulsen av Steinum, verður latið fríggjadagin**

GÁVUGÓÐS
*tíðindaskriv*

Fríggjadagin 11. februar klokkan 10. verður gávugóðs latið úr Grunni Thorvalds Poulsen av Steinum.

Thorvald Poulsen av Steinum var gartnari í Havn. Hann hevði stóran áhuga fyri bókmentum og list, og hann stovnaði grunnin, sum ber navn hansara. Endamálið hjá grunninum er at stuðla og eggja ungum fólki við listarligum hegni til útbúgving.

Nevndin í grunninum er mannað við rektaranum á Fróðskaparsetrinum, sum formanni, formanninum í LISA og formanninum í Føroya Lærarafelag. Tey eru í løtuni Jóan Pauli Joensen, Jenny C. Petersen og Jóhannes Eli Iversen.

Gávuðgóðsið varð fyrstu ferð latið í 2001. Tá fekk listakvinnan Rannvá Kunoy 60.000 krónur úr grunninum. Í 2002 fingu 3 listafólk gávu úr grunninum. Trombone spælarin Andrass Olsen fekk 60.000 krónur, filmsleikstjórin Teitur Árnason og rithøvundurin Petur Elias Askham Guttesen fingu hvør sínar 25.000. krónur. Í 2003 fekk tónleikarin og tónaskaldið Tróndur Bogason 60.000 krónur. Í fjør fingu trý ung listafólk gávugóðs, tey vóru Marjun Kjelnæs, rithøvundur, Jógvan Sverrason Biskopstø, sniðgevi og teknari, og Eivør Pálsdóttir, songkvinna, tey fingu 25.000 kr. í part.

Handanin, sum er almenn, verður á Setursskrivstovuni á Fróðskaparsetrinum



*Thorvalds Poulsen av Steinum*

# – Eg føli at eg geri mun

**– Tað ber ikki til við orðum at lýsa oyðileggingarnar í Banda Aceh. Tær eru sera ógvusligar, men tað eru eisini glottar, sigur Ingrid Holm, sum hevur verið til arbeiðis í Indonesien í eina viku**

NEYÐHJÁLP
*Løgmansskrivstovan*



*Ingrid Holm ger seg til reiðar til ta longu ferðina eystur um hav. Hon er nú komin til arbeiðis – og har hevur hon nóg mikið at gera*

– Samfelagið er so spakuliga við at koma í gongd aftur, tó er tað sera trupult, greiðir Ingrid Holm frá um fylgisveinatelefon úr Banda Aceh.

Tað er nú góð vika síðani sjúkrarrøktarfrøðingurin Ingrid Holm fór til Indonesia at luttaka í neyðhjálpararbeiðinum á flytbaru skaðastovuni, sum danska tilbúgvingarstýrið hevur sent til Banda Aceh í Indonesia. Indonesia er tað landið í Asien ið varð meinast rakt av Tsunami-flóðalduni.

Av tí at so nógv fólk hava latið lív, er eingin at røkja nógv týdningarmikil størv, og stórir partar av samfelagum virka ikki.

Arbeitt verður nú við at fáa indonesar at taka yvir, har sum altjóða neyðhjálpararbeiðið er.

### Góður máti at veita neyðhjálp

Sjálv er Ingrid, við sínum drúgvu royndum, væl fyrireikað at taka stóru avbjóðingina, at starvast í einum øki har ein stór vanlukka er hend.

Tað er krevjandi at búgva í legum, og tað elvir javnan til trupulleikar, tá nógv fólk ymsastaðni frá skulu samstarva.

Men Ingrid Holm sigur seg fáa nógv burturúr.

– Eg síggi, at eg við mínum førleika geri mun, sigur Ingrid, sum metir, at Føroyar eiga at luttaka beinleiðis í neyðhjálpini.

Hon er púra sannførd um, at føroyingar eiga nógv fólk, sum kunnu gera eitt munagott arbeiði undir tílíkum umstøðum.

Flestu londini hava sent lið avstað til neyðhjálpararbeiðið, men Ingrid er einsamøll úr Føroyum, og tað heldur hon vera ein vansa.

– Eg haldi, at tað hevði verið eitt gott hugskot, at sent, t.d. ein føroyskan skurðlækna og tveir skurðsjúkrarrøktarfrøðingar avstað saman, sigur Ingrid Holm.

### Hevur tað gott

Ingrid sigur at hon hevur tað gott, hóast hitin í Banda Aceh liggur omanfyri 35 stig.

– Stórt sæð fer øll tíðin við at arbeiða, eta og sova. Her er nógv at gera, greiðir Ingrid frá.

Ein dag hevur hon tó verið og sæð hvussu sær út í Banda Aceh-økinum, ið liggur har har norðuri á indonesisku oynni Sumatra. Einki alnóta- ella vanligt telefonsamband er við leguna í Banda Aceh, tí er tað trupult hjá Ingrid at geva boð frá sær.

Einasta samband við leguna er um fylgisvein, men hetta samband er óstøðugt, skrivar heimasíðan hjá Løgmansskrivstovuni.

# 300 ungfólk hugnaðu sær í Nesvík

**Álvari og gaman fylgdust, tá 300 juniorar úr øllum landinum hittust til legu í Leguhúsinum í Nesvík**

BARNAARBEIÐI
*Snorri Brend*



*Tey sótu so hugagóð og lurtaðu eftir undirvísingini*

Hesi seinastu árini er eitt stórt andaligt arbeiði farið fram fyri børnini og tey ungu.

Ein bólkur, ið liggur millum hesar báðar, eru juniorarnir – tað vil siga, tey sum ganga í 5. flokki og uppeftir. Men eyguni eru so líðandi eisini farin at venda sær móti hesum ungu dreingjunum og gentunum.

Í fleiri missiónshúsum og samkomuhúsum kring landið hevur ein tí í dag skipað hetta í eina serstaka grein, sum beinleiðis vendir sær til henda aldursbólkin.

Tey savnast regluliga til juniormøtir, men hava eisini áhuga fyri at hitta onnur ung í teirra aldri. Hetta høvið fingu tey seinasta vikuskiftið í Leguhúsinum í Nesvík, tá henda juniorlegan var á skránni.

### Nærkast meti

Tað var annars ikki nógv sum bendi á, at henda legan skuldi gerast veruleiki.

Í vikuni undan leguni var talið av luttakarum so mikið lágt, at fyrireikarnir ivaðust í um legan yvirhøvur gjørdist veruleiki.

Men fáar dagar undan leguni streymaðu tilmeldingarnar inn í slíkum tali, at eingin ivi var um úrslitið: Juniorlegan gjørdist veruleiki.

Tá upptalt varð vóru nærum 300 ungfólk teknaði til leguna. Saman við leiðarum og hjálparfólki var talið av luttakarum hetta vikuskiftið um tey 320 – og man tað fara at nærkast einum meti hjá leguhúsinum.

Legan byrjaði fríggjakvøld og endaði leygarkvøld, tá teir troyttu, men kortini fegnu luttakararnir fóru í hvør sína ætt.

### Skapanin

Á eini slíkari legu er altíð nógv á skránni, sjálvt um legan er stutt og skráin umfatandi.

Evni fyri leguna hesaferð var um Skapanina, har Ejvind Mouritsen úr Havn segði frá. Tíð var eisini til annað slag av undirvísing, m.a. við vitjan av einum trúboðarapari úr Afrika.

Millum øll hesi tiltøkini var gott høvi hjá hesum ungu at tosa saman og hugna sær saman við øllum hinum. Og sjálvandi varð eisini nakað keypt í kioskini, ta løtuna hon var opin.